

# TILMÆLI

## TÍÐ TIL ANNAÐ ARBEIÐI

### FYRIREIKING OG EFTIRMETING

**Handað**
22. mars 2023

**Til**
Kommunala Arbeiðsgevarafelagið
og Føroya Pedagogfelag

**Skrivað**
Annika Østerø, Maika L. Samuelsen,
Ann Hansen og Bina Reginsdóttir

# Innihaldsyvirlit

Inngangur ........ 3
Yvirlit yvir tilmæli ........ 5
Kanningin allýsir hugtøkini fyrireiking og eftirmeting........ 6
Fylgibólkurin allýsir hugtøkini fyrireiking og eftirmeting ........ 7
Úrslit av kanningini........ 9
Tilmælir í sambandi við §10 *Tíð til annað arbeiðið*........ 12
Samanhangir og staðfestingar til umhugsanar ........ 27

# Inngangur

Við hesum verður tilmælið um "Tíð til annað arbeiði" handað Kommunala Arbeiðsgevarafelag (KAF) og Føroya Pedagogfelag (FP).

Partarnir báðir, Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Føroya Pedagogfelag, gjørdu eitt sokallað protokollat frá samráðingunum 2020 til sáttmálaskeiðið 2020 – 2023, og vórðu samd um at lýsa verandi skipanir, ið koma undir *§ 10 tíð til annað arbeiði*.

Lýsingin av skipanum er gjørd av uttanveltaðum kanningartoymi, sum varð mannað við serkønum fólki við ymiskum fakkunnleika, og sum báðir partar – FP og KAF - vóru samdir um. Hjørdis Gaard, Gitte Klein og Anna Sofía Veyhe mannaðu toymið.

Somuleiðis varð ein stýris- og fylgisbólkur mannaður við umboðum úr Føroya Pedagogfelag og KAF. Stýrisbólkurin hevur millum annað havt ábyrgdina av kanningini, har tey hava sett karmar, fylgt við og tryggjað sær, at kanningin hevur verið gjørd í tráð við protokollatið partanna millum. Somuleiðis hevur stýrisbólkurin eisini havt ábyrgdina av, at kanningin hevur verið grundfest í egnum fyriskipanum og bygnaði.

Umboðini í stýrisbólkinum eru:

Anita Fuglø, leiðari í KAF

Bina Reginsdóttir, fulltrúi í KAF

Jógvan Philbrow, formaður í Føroya Pedagogfelag

Birita Hammer Jacobsen, umsitingarleiðari í Føroya Pedagogfelag

Partarnir valdu tvey umboð í part til ein fylgibólk, ið skuldu ráðgeva og vegleiða kanningartoymið í tann mun, tørvur hevur verið á tí. Somuleiðis var uppgávan hjá fylgibólkinum at gera tilmæli um, hvussu arbeiðið kann skipast framyvir.

Umboðini í fylgibólkinum eru:

Bina Reginsdóttir, cand.scient.adm. og fulltrúi í KAF

Ann Hansen, B.Ed. sum námsfrøðingur og eindarleiðari í Tórshavnar kommunu

Annika Østerø, B.Ed. sum námsfrøðingur og stovnsleiðari í Tórshavnar kommunu og nevndarlimur í Føroya Pedagogfelag

Maika L. Samuelsen námsfrøðingur á sertilboði innan skúlatilboð

Fylgibólkurin hevur havt fundir við kanningartoymið umframt regluliga at hava veitt teimum vegleiðing. Eftir at kanningararbeiðið og sjálv kanningin vóru liðug, hevur fylgibólkurin javnan havt fundir, har vit hava skift orð um evni, úrslit og niðurstøður, sum eru grundarlagið undir hesum tilmælum.

Tilmælini verða handað og løgd fram á einum felags evnisdegi tann 22. mars 2023 fyri álitisfólkum, leiðslum, umboðum fyri kommunurnar og øðrum viðkomandi pørtum.

Fylgibólkurin mælir pørtunum til at taka undir við tilmælunum, so at vit framhaldandi og miðvíst kunnu menna og økja um fakligu dygdina á dagstovnunum kring landið.

Tórshavn 22. mars 2023

Annika Østerø og Maika L. Samuelsen umboð fyri Føroya Pedagogfelag

Bina Reginsdóttir og Ann Hansen umboð fyri KAF

# Yvirlit yvir tilmæli

1. Mælt verður til, at partarnir taka undir við allýsingini hjá fylgibólkinum av hugtøkunum, fyrireiking og eftirmeting.

2. Mælt verður til, at starvsfólk hava fasta fyrireikingar- og eftirmetingartíð, og at dagstovnaleiðarin fyriskipar hesi viðurskifti.

3. Mælt verður til, at bæði leiðarar og starvsfólk javnan fáa skeið innan námsfrøðiliga økið, umframt førleikamenning til at brúka eftirmetingartilgongdir og -amboð.

4. Mælt verður til, at leiðslurnar hugsa um, nær á degnum barnatalið á stovninum er stórt, og at hava fyrireikingartíðina, tá trýstið ikki er so stórt. Eisini verður mælt til, at arbeiðsgevararnar og leiðslurnar serliga leggja dent á, hvussu betrast kann um umstøðurnar hjá starvsfólkum í vøggustovum og barnagørðum at hava fyrireiking og eftirmeting.

5. Mælt verður til, at starvsfólk verða sett at arbeiða fullan starvsbrøk ella so høgan sum møguligt.

6. Mælt verður til, at høli er til fyrireiking og eftirmeting á stovninum, og at lagt verður upp fyri hesum, tá ið stovnar verða bygdir út ella við nýbygging.

7. Mælt verður til, at leiðarin, í tann mun tað ber til, tryggjar, at uppgávur, sum ikki eru partar av námsfrøðiligum arbeiðinum, verða útintar av øðrum fakbólkum, so sum húsavørðum og reingerðarfólkum.

8. Mælt verður til, at leiðarin tryggjar, at tíð til fyrireiking og eftirmeting fevnir um øll børnini og ikki einans børn við serligum tørvi.

# Kanningin allýsir hugtøkini fyrireiking og eftirmeting

Kanningartoymið hevur nágreinað hugtøkini, fyrireiking og eftirmeting fyri leiðarar og starvsfólk á dagstovnaøkinum, sum niðanfyristandandi. Út frá hesum hava leiðarar og starvsfólk svarað spurnakanningini.

<u>Fyrireiking hjá leiðarunum varð nágreinað soleiðis:</u>

*"Fyrireiking skal skiljast sum fyrireiking av námsfrøðiliga virkseminum á stovninum t.d. ársætlanir, virksemisætlanir, foreldraviðtalur, ráðleggingardagar, arbeiðsgongdir og mannagongdir og starvsfólkafundir."*

<u>Eftirmeting hjá leiðarunum varð nágreinað soleiðis:</u>

*"Eftirmeting hjá leiðarum skal skiljast sum ein tilgongd, ið krevur umhugsan, greining og týðilig metingarstøði, og verður gjørd fyri at fremja betringar. Sostatt er eftirmeting her ikki ein leypandi meiri óskipað meting. Eftirmeting fer fram av námsfrøðiliga virkseminum, tilgongdum og úrslitum at tryggja námsfrøðiligu góðskuna. Eftirmeting kann gerast uttan og við eftirmetingaramboðum, t.d. við umhugsanar- og greiningaramboðum SMTTE og mátiamboðum sum t.d. TÍTT, SOS, SPU, TRAS og TRASMO og góðskumetingar av læruumhvørvinum á stovninum, t.d. KIDS."*

<u>Fyrireiking hjá starvsfólkunum varð nágreinað soleiðis:</u>

*"Fyrireiking hjá starvsfólkum skal skiljast sum námsfrøðilig fyrireiking, t.d. tríggjar mánaða samrøður, námsfrøðilig ráðgeving, skriv og skjalfesting í sambandi við børn við serligum tørvi, Betri Vinir, Stig fyri Stig, Brúgvasamband, at fyrireika foreldrafundir, viðtalur, byrjanarsamrøður, stovufundir og lesa sær námsfrøðiliga vitan."*

<u>Eftirmeting hjá starvsfólkunum varð nágreinað soleiðis:</u>

*"Eftirmeting hjá starvsfólkum skal skiljast sum ein skipað tilgongd, ið krevur umhugsan, greining og týðilig metingarstøði og verður gjørd fyri at fremja betringar. Tað vil siga, at eftirmeting her ikki skal skiljast sum meiri óskipaðar metingar, tankar og samrøður. Eftirmeting av námsfrøðiliga virkseminum kann gerast við t.d. at eftirmeta tilgongdir og úrslit, við at eygleiða barnið, at skjalfesta í sambandi við Sernám, Barnaverndartænastuna og Børn&Ung (Tórshavn) og við t.d. umhugsanar- og greiningaramboðnum SMTTE og máliamboðum, sum t.d. SPU, SOS, TÍTT, TRAS og TRASMO."*

# Fylgibólkurin allýsir hugtøkini fyrireiking og eftirmeting

Fylgibólkurin mælir til allýsingina niðanfyri av fyrireiking og eftirmeting til báðar partar at taka undir við. Hendan allýsingin tekur støði bæði í tí kvalitativu og kvantitativu kanningini, tí fylgibólkurin metir, at hugtøkini verða lýst í breiðari merking enn tað, sum kanningartoymið hevur nágreinað.

<u>Allýsing av fyrireiking hjá leiðaranum:</u>

Fyrireikingaruppgávurnar verða skilmarkaðar sum at seta yvirskipað mál í samsvari við dagstovnalógina og námsfrøðiligu stevnumiðini og námsætlanina á stovninum, har leiðarar skapa karmar fyri fyrireiking, so at stovnsdygdin javnan verður endurskoðað og røkt. Leiðarin eigur at vera sentralur partur av fyrireikingarhugtakinum, har hann bæði setur í verk, fasiliterar og motiverar, er ígongdseti, sparrar, delegerar uppgávur v.m. Hann hevur høvuðsábyrgdina fyri námsfrøðiliga virkseminum á stovninum, har hann í samstarvi við starvsfólk fyrireikar námsætlanir, ársætlanir, virksemisætlanir, foreldraviðtalur, foreldrafundir, sernámsfrøðiligar og námsfrøðiligar fundir, ráðleggingardagar, arbeiðsgongdir, mannagongdir og starvsfólkafundir. Umframt at leiðarin eisini hevur ábyrgdina av foreldraráðsarbeiði, ymisk netverkssamstarv, samstarv við eindarleiðslu, samskipara og/ella kommunu og onnur líknandi samstarv, hevur hann eisini setanarsamrøður og starvsfólkasamrøður.

Allýsing av eftirmeting hjá leiðaranum:

Eftirmeting er ein tilgongd, ið krevur umhugsan, grundan, greining og viðgerð, og verður gjørd fyri at fremja betringar. Eftirmetingin verður framd av námsfrøðiliga virkseminum og tilgongdum fyri at tryggja námsfrøðiligu góðskuna. Eftirmeting kann gerast við og uttan eftirmetingar- og mátiamboðum. Eftirmetingaramboð sum SMTTE, TÍTT, SOS, SPU, TRAS, TRASMO, kunnu nýtast av stovnunum sjálvum, umframt at aðrar góðskumetingar av læruumhvørvinum s.s. KIDS eisini kunnu brúkast. Alt virksemi á stovninum eigur at verða eftirmett, hetta fyri at seta nýggj mál og tryggja framgongd í námsfrøðiliga høpinum, líkasum trivnaður og framgongd eisini skulu tryggjast hjá starvsfólkunum.

Allýsing av fyrireiking hjá starvsfólkum:

Fyrireiking av námsfrøðiliga arbeiðinum eigur at verða gjørt við støði í dagstovnalógini, námsfrøðilig stevnumiðunum og námsætlanini á stovninum. Tá námsfrøðiliga virksemið verður fyrireikað, bæði yvirskipað og til ávís børn, kunnu amboð sum TÍTT, TRAS, Betri vinir, piktogramm v.m. verða brúkt. Starvsfólk fyriskipa og leggja til rættis foreldrasamstarv, innkoyring av nýggjum børnum, námsfrøðiligt dags- og vikuligt virksemi. Tað er av týdningi, at leiðarin er tøkur til sparring og sum fasilitator, tá tørvur er á tí.

Allýsing av eftirmeting hjá starvsfólkum:

Eftirmetingararbeiðsuppgávur hjá starvsfólkum, verða settar í samband við eftirmeting av námsfrøðiliga arbeiðinum/virkseminum. Trivnaður, rørsla, heilsuviðurskifti, menning hjá einstaka barninum, stovu- og starvsfólkafundir, foreldraviðtalur, innkoyringar v.m. skulu eftirmetast. Somuleiðis skulu skriv gerast til eitt nú barnaverndatænastur, Sernám, Barna- og ungdómspsykiatri. Ymisk eftirmetingaramboð og/ella eftirmetingartilgongdir kunnu verða brúkt sum hjálp til at menna gongdina víðari.

# Úrslit av kanningini

Hyggja vit eftir miðaltølunum í tímum til fyrireiking og eftirmeting, so brúka leiðarar í miðal 9 tímar til fyrireiking og 4 tímar í miðal til eftirmeting um vikuna. Námsfrøðingar brúka 3 tímar og hjálparfólk 1,8 tímar í miðal til fyrireiking um vikuna. Harumframt brúka námsfrøðingar 1 tíma og hjálparfólk 0,6 tímar í miðal um vikuna til eftirmeting.

**Mynd 1. Tíðarnýtslan hjá leiðarum til fyrireiking og eftirmeting í miðal um vikuna**




**Mynd 2. Fyrireiking og eftirmeting hjá námsfrøðingum og hjálparfólkum í miðal um vikuna**




Hyggja vit eftir tølunum um, hvussu nógv meta seg hava neyðugu tíðina til fyrireiking og eftirmeting, so meta 22% av námsfrøðingunum og 15% av hjálparfólkunum seg í stóran og sera stóran mun hava neyðugu tíðina til fyrireiking, meðan 51% av námsfrøðingunum og 54% av hjálparfólkunum meta, at tey í lítlan og sera lítlan mun hava neyðugu tíðina til fyrireiking. Hjá námsfrøðingunum er talið enn hægri sum, í lítlan ella sera lítlan mun, meta seg hava neyðugu tíðina til eftirmeting - sí mynd 3 og 4.

**Mynd 3. Í hvønn mun starvsfólkini hava neyðugu tíðina til fyrireiking**




Spurningur: *"Í hvussu stóran mun metir tú teg hava neyðugu tíðina til fyrireiking?"*

**Mynd 4. Neyðugu tíðina tøka til eftirmeting**




Spurningur: *"Í hvussu stóran mun metir tú teg hava neyðugu tíðina til at eftirmeta?"*

Til spurningin um tað kemur fyri, at ongin fyrireiking er vegna ov fá starvsfólk, eru ávikavist 21% og 19% av námsfrøðingum og hjálparfólk, ið svara ongantíð/sjáldan. Við øðrum orðum svarar meginparturin av øllum starvsfólkunum, at tey av og á ella ofta/sera ofta ikki hava fyrireiking vegna ov fá starvsfólk.

**Mynd 5. Eingin fyrireiking hjá námsfrøðingum og hjálparfólkum vegna ov fá starvsfólk**




Spurningur: *"Kemur tað fyri, at tú ikki fyrireikar teg, tí tað eru ov fá starvsfólk á stovuni?"*

Hyggja vit eftir orsøkunum til, hví starvsfólk ikki hava tíð til fyrireiking, so síggja vit, at størsti parturin svarar, at ikki ber til at finna nakran avloysara - sí mynd 6 niðanfyri.

**Mynd 6. Orsakir til, at eingin avloysari kemur á stovuna**




Spurningur: *"Um tímar mangla á einari stovu og eingin kemur inn á stovuna at dekka hesar tímarnar, er orsøkin/orsakirnar í flestu førum (til ber at seta fleiri frámerki)?"*

Tað kann hugsast, at tá stovnurin er raktur av sjúku millum starvsfólk, má arbeiðið við fyrireiking og eftirmeting víkja, og barnatíðin raðfestast. Hinvegin kann hugsast, at eru øll starvsfólk tøk og barnatalið er lágt, tá er møguligt, at leiðarin ásetir meira tíð til fyrireiking og eftirmeting. Hetta sigur kanningin tó onki um.

# Tilmælir í sambandi við §10 *Tíð til annað arbeiðið*

Fylgibólkurin metir tað vera umráðandi, at fyri at hava eitt gott grundarlag og felags forstáilsi í samstarvinum frameftir partarnar millum, so er neyðugt við hesum fyrsta tilmælinum:

> Mælt verður til, at partarnir taka undir við allýsingini hjá fylgibólkinum av hugtøkunum, fyrireiking og eftirmeting.

<u>Fyrireiking og eftirmeting</u>

Fylgibólkurin vísir á, at tað er dagstovnaleiðarin, sum skipar fyrireikingina og eftirmetingina, og hetta arbeiðið verður gjørt, tá umstøðurnar loyva tíð.

Vit kunnu ikki staðfesta út frá kanningini, um øll starvsfólk hava tíð til fyrireiking, men vit síggja, at nøkur hava fasta fyrireiking, meðan onnur svara, at tey fyrireika so hvørt. Á myndini niðanfyri sæst, at 42% av námsfrøðingunum og 76% av hjálparfólkunum onga fasta tíð hava til fyrireiking.

Størsti parturin av teimum, sum hava fyrireiking, hava ávikavist 1-1½ tíma og 2½ tíma, meðan sera fá hava 3 tímar ella fleiri.

**Mynd 7. Føst tíð til fyrireiking**




Spurningur: *"Hvussu nógvar tímar í miðal um vikuna eru settir fast av til, at tú fyrireikar námsfrøðiligar arbeiðið?"*

Í mun til fyrireiking so hvørt, sæst, at miðal tímatalið er hægri - bæði hjá námsfrøðingum og hjálparfólkum. Tó eru framvegis nøkur, sum onga tíð hava til fyrireiking so hvørt.

**Mynd 8. Fyrireikingartíð so hvørt**




Spurningur: *"Hvussu nógvar tímar í miðal um vikuna fyrireikar tú námsfrøðiliga arbeiðið, so hvørt tað liggur fyri?"*

Til spurningin, í hvønn mun starvsfólkini meta seg hava neyðugu tíðina til fyrireiking, eru gott og væl helvtin av bæði námsfrøðingum og hjálparfólkum, sum í lítlan ella sera lítlan mun meta seg hava neyðugu tíðina, og bert ávikavist 22% og 15%, sum meta seg í stóran og sera stóran mun hava neyðugu tíðina. Sí mynd 3.

Sum áður nevnt, sigur stórur partur av starvsfólkunum, at tað kemur av og á ella ofta/sera ofta fyri, at tey ikki fyrireika seg, tí tað eru ov fá starvsfólk á stovuni, og størsti parturin svarar, at orsøkin til hetta er, at ikki ber til at finna nakran avloysara.

Kanningin vísir, at sannlíkindini fyri, at starvsfólk eftirmeta námsfrøðiliga arbeiðið er 3 ferðir størri hjá starvsfólkum, ið hava fasta fyrireikingartíð. Eisini vísir kanningin ein týðandi positivan samanhang millum at hava fasta fyrireikingartíð og at vera námsfrøðingur.

Hinvegin er ein negativur samanhangur millum, at starvsfólk mangla á stovuni, og hvørt starvsfólk hava fasta fyrireikingartíð.

Fylgibólkurin metir tað hava stóran týdning fyri dygdina av námsfrøðiliga arbeiðinum, at starvsfólk eftirmeta, tí sum vit síggja á myndunum 9 og 10 niðanfyri, so meta bæði leiðarar, námsfrøðingar og hjálparfólk, at eftirmeting elvir til broytingar í námsfrøðiliga arbeiðinum - bæði partvís og í stóran og sera stóran mun.

**Mynd 9. Í hvønn mun eftirmeting elvir til broytingar í námsfrøðiliga arbeiðinum - leiðarar**




Spurningur: *"Í hvussu stóran mun upplivir tú, at arbeiðið við eftirmeting á stovninum elvir til broytingar?"*

**Mynd 10. Í hvussu stóran mun eftirmeting elvir til broytingar – námsfrøðingar og hjálparfólk**




Spurningur: *"Í hvussu stóran mun upplivir tú, at títt arbeiði við eftirmeting elvir til broytingar í námsfrøðiliga arbeiðinum?"*

Sum vit hava sæð omanfyri, metir ein stórur partur av starvsfólkunum seg ikki hava neyðugu tíðina til fyrireiking. Somuleiðis svarar meira enn helvtin av leiðarunum, at teir meta, at starvsfólkini einans partvís ella í lítlan ella sera lítlan mun hava neyðugu fyrireikingartíðina. (sí mynd 11 niðanfyri).

**Mynd 11. Í hvønn mun starvsfólkini hava neyðugu fyrireikingartíðina**




Spurningur: *"Í hvussu stóran mun metir tú, at starvsfólkini hava neyðugu tíðina at fyrireika námsfrøðiliga arbeiðið?"*

Tá ið vit kunnu lesa í kanningini, at bæði leiðarar og starvsfólk uppliva, at eftirmeting førir broytingar við sær í námsfrøðiliga arbeiðinum, og at sannlíkindini fyri at starvsfólk eftirmeta eru 3 ferðir størri hjá starvsfólkum, ið hava fasta fyrireikingartíð, so vil okkara tilmæli vera soljóðandi:

Mælt verður til, at starvsfólk hava fasta fyrireikingar- og eftirmetingartíð, og at dagstovnaleiðarin fyriskipar hesi viðurskifti.

Eftirmetingartilgongdir

Fylgibólkurin hevur ta fatan, at førleikamenning - bæði hjá leiðarum og starvsfólkum - hevur stóran týdning í sambandi við dygdina av tí námsfrøðiliga arbeiðinum.

Vit síggja eisini í úrslitinum av kanningini, at tað er ein positivur samanhangur millum at starvsfólk førleikamenna seg og hava fasta fyrireikingartíð.

Hyggja vit at tali av skeiðum, ið starvsfólkini taka, hava 28% av námsfrøðingunum og 39% av hjálparfólkunum svarað, at tey taka eingi skeið, meðan 49% av námsfrøðingunum og 38% av hjálparfólkunum taka ½-1 skeið um árið.

**Mynd 12. Skeið, viðkomandi fyri námsfrøðiliga økið hjá námsfrøðingum og hjálparfólkum**




Spurningur: *"Hvussu nógv skeið, viðkomandi fyri námsfrøðiliga økið, tekur tú í miðal um árið?"*

Somuleiðis síggja vit á eftirfylgjandi mynd 13, at úrslitið av kanningini vísir ein greiðan tørv á at seta tíð av til at arbeiða meira við at menna førleikarnar at brúka eftirmetingartilgongdir og -amboð. Til henda spurningin svara 75% av námsfrøðingunum, 58% av hjálparfólkunum og 73% av leiðarunum, at tey í stóran ella sera stóran mun hava tørv á at menna hesar førleikar.

**Mynd 13. Tørvurin á at menna førleikarnar at brúka eftirmetingartilgongdir og -amboð - leiðarar**




Spurningur: *"Í hvussu stóran mun metir tú tað vera tørvur á, at seta tíð av til at arbeiða meiri við at menna førleikarnar at brúka eftirmetingartilgongdir og eftirmetingaramboð?"*

**Mynd 14. Tørvurin á at menna førleikarnar at brúka eftirmetingartilgongdir og –amboð**




| | Í sera lítlan og lítlan mun | Partvíst | Í stóran og sera stóran mun |
|---|---|---|---|
| Hjálparfólk | 10% | 32% | 58% |
| Námsfrøðingar | 3% | 23% | 74% |

Hjálparfólk Námsfrøðingar

Spurningur: *"Í hvussu stóran mun metir tú tað vera tørvur á at seta tíð av til at arbeiða meiri við at menna førleikarnar at brúka eftirmetingartilgongdir og –amboð?"*

Havandi í huga týdningin av framhaldandi betran av námsfrøðiligu dygdini, hevur fylgibólkurin soljóðandi tilmæli:

Mælt verður til, at bæði leiðarar og starvsfólk javnan fáa skeið innan námsfrøðiliga økið, umframt førleikamenning til at brúka eftirmetingartilgongdir og -amboð.

<u>Tíðarnýtsla og munir millum vøggustovu, barnagarðar og frítíðarskúlar til fyrireiking og eftirmeting</u>

Kanningin vísir, at munur er á, nær á degnum at ávikavist starvsfólk í vøggustovum, barnagørðum og frítíðarskúlum hava fyrireiking og eftirmeting. Hjá starvsfólkum í vøggustovum toppar tíðin til fyrireiking og eftirmeting ímillum umleið kl. 11.30 og 12. Til samanberingar toppar tíðin hjá starvsfólkum í barnagørðum millum umleið kl. 8 og kl. 10 og í frítíðarskúlum millum kl. 11 og 12 og aftur millum kl. 13.30 og 15.45.

Tað ber tó ikki til at staðfesta, um øll tíðin, sum starvsfólkini brúka uppá fyrireiking og eftirmeting, er uttan børn. Hyggja vit eftir myndini av tíðarnýtslu hjá starvsfólkunum við øllum

uppgávubólkunum sæst, at barnatíðin økist alsamt frá kl. 7 til 9, og økist síðani meira javnt til umleið kl. 11.30. Tá sæst eitt fall, sum síðani økist aftur frá umleið kl. 13 til 15, har barnatíðin fellur aftur.

**Mynd 15. Dagurin hjá starvsfólkunum við øllum uppgávubólkunum**




Tað kann tí hugsast, at ein partur av tíðini er saman við børnunum.

Mynd 16 vísir, hvussu fyrireikingartíðin er býtt millum starvsfólk á vøggustovum, barnagørðum og frítíðarskúlum, og har síggja vit ein týðiligan mun á, at starvsfólk í frítíðarskúlum hava nærum tvífalt so nógva fyrireikingartíð sum starvsfólk í barnagørðum.

**Mynd 16. Føst fyrireikingartíð og fyrireiking so hvørt býtt á vøggustovur, barnagarðar og frítíðarskúlar**




Fylgibólkurin undrast á, hví so stórur munur er, og metir, at tað er umráðandi, at partarnir hava í huganum, at tørvurin á at betra um umstøðurnar viðv. fyrireiking er størri í vøggustovunum og barnagørðunum enn í frítíðarskúlum.

Tað er ymiskt, nær ið starvsfólkini í ávikavist vøggustovum, barnagørðum og frítíðarskúlum hava fyrireiking og eftirmeting. Kanningin sigur onki um, hvat orsøkin er til tess. Tað kann tó hugsast, at starvsfólkini hava fyrireikingartíðina, tá ið barnatalið ella trýstið á stovninum er minst. Vit kunnu tó ikki staðfesta hetta, men av tí, at vit frammanundan hava sæð, at stórur partur av starvsfólkunum ikki meta seg hava neyðugu tíðina til fyrireiking og eftirmeting, so metir fylgibólkurin, at júst hetta kann vera ein umráðandi faktorur at hava við, og tí hevur fylgibólkurin soljóðandi tilmælir:

- Mælt verður til, at leiðslurnar hugsa um, nær á degnum barnatalið á stovninum er stórt, og at hava fyrireikingartíðina, tá trýstið ikki er so stórt.
- Eisini verður mælt til, at arbeiðsgevararnar og leiðslurnar serliga leggja dent á, hvussu betrast kann um umstøðurnar hjá starvsfólkum í vøggustovum og barnagørðum at hava fyrireiking og eftirmeting.

Starvsbrøkur

Námsfrøðingar arbeiða í miðal 33 tímar um vikuna, og hjálparfólk arbeiða í miðal 30 tímar um vikuna. Bert 17% av námsfrøðingunum og 5% av hjálparfólkunum svara, at tey arbeiða 40 tímar um vikuna.

Sambært kanningini er ein positivur samanhangur millum tess hægri starvsbrøk hjá starvsfólkunum, tess fleiri tímar til fyrireiking so hvørt. Somuleiðis er ein positivur samanhangur millum tess hægri starvsbrøk hjá starvsfólkunum, og um tey eftirmeta.

Eisini sæst, at ein positivur samanhangur er millum starvsbrøk og fyrireikingartíð, skeið og førleikamenning. Við øðrum orðum er nógv, ið bendir á, at mest er at vinna hjá øllum pørtum, um starvsfólk verða sett fulla tíð ella í so høgan brøk sum gjørligt. Fylgibólkurin hevur tí soljóðandi tilmæli:

Mælt verður til, at starvsfólk verða sett at arbeiða fullan starvsbrøk ella so høgan sum møguligt.

Hølir

Við grundarlagi í úrslitum av kanningini hevur fylgibólkurin ta fatan, at um fyrireiking og eftirmeting skal eydnast, er umráðandi at hava nøktandi hølir til tess.

Til dømis sæst, at 66% av námsfrøðingunum og 31% av hjálparfólkunum fyrireika seg heima við ella uttan løn, meðan 40% av námsfrøðingunum og 19% av hjálparfólkunum fyrireika seg í hølum einsamøll.

**Mynd 17. Hvar fyrireikingin fer fram**




Spurningur: *"Hvar fyrireikar tú teg (til ber at seta fleiri frámerki)?"*

Eisini verður víst á, at starvsfólk kenna seg strongd av at taka arbeiðið heim við, men tey gera tað kortini, antin av tí at tað mangla tímar, at tey verða órógvað, ella tí ongi hølir eru á stovninum. Fyri at starvsfólkini skulu fáa frið til at hugsavna seg, og hava møguleika fyri at sparra við leiðaran, tá tey hava fyrireiking ella eftirmeting, umframt at fyribyrgja, at starvsfólkini skulu kenna seg strongd og noydd at arbeiða heima, so metir fylgibólkurin tað vera umráðandi, at tey so vítt møguligt fáa hølir á stovninum til tess. Eisini er betri møguleiki hjá starvsfólkunum at fyrireika og eftirmeta saman við øðrum starvsfeløgum. Tá starvsfólk fyrireika og eftirmeta á dagstovninum, er lættari hjá leiðaranum eitt nú at flyta føstløgdu fyrireikingina vegna sjúku v.m. Fylgibólkurin hevur tí hetta tilmæli:

Mælt verður til, at høli er til fyrireiking og eftirmeting á stovninum, og at lagt verður upp fyri hesum, tá ið stovnar verða bygdir út ella við nýbygging.

<u>Praktiskar uppgávur</u>

Innan umvælingararbeiði/húsavarðaarbeiði eru tað 47% av námsfrøðingunum og 35% av hjálparfólkunum, sum útinna arbeiði av slíkum slag. 45% av námsfrøðingunum og 31% av hjálparfólkum brúka millum 20 min. og 4 tímar til umvælingararbeiðið um mánaðin. Leiðarar brúka í miðal 6 tímar um mánaðin til handverkara-/húsavarðauppgávur.

**Mynd 18. Tíðarnýtsla til umvælingararbeiði – námsfrøðingar og hjálparfólk**




Spurningur: *"Hvussu nógvar tímar brúkar tú í miðal til umvælingararbeiði um mánaðin (handverkara/húsavarðaarbeiði, t.d. heingja hillar upp, skifta ljósperur, mála veggir og umvæla vognar)?"*

Viðvíkjandi reingerð brúka leiðarar í miðal 1½ tíma um vikuna, og 35% av leiðarunum gera høvuðsreint á stovninum.

Tíðarnýtslan hjá námsfrøðingum og hjálparfólkum vísir, at 43% av øllum starvsfólkunum brúka minni enn 1 tíma um vikuna til reingerð, meðan 49% brúka 1-4 tímar um vikuna til reingerð.

24% av námsfrøðingunum og 31% av hjálparfólkunum svaraðu ja uppá spurningin, um tey gera høvuðsreint á stovuni.

**Mynd 19. Tíðarnýtsla hjá námsfrøðingum og hjálparfólkum til reingerð**




Spurningur: *"Hvussu nógvar tímar brúkar tú til reingerð, t.d. vaska leikur, klæðir, vindeygu, køliskáp v.m. í miðal um vikuna?"*

Fylgibólkurin metir, at tað er óheppið, at starvsfólk brúka so nógva tíð upp á reingerð og umvælingararbeiði - serliga tá tey frammanundan ikki meta seg hava neyðugu tíðina, hvørki til fyrireiking ella eftirmeting. Vælvitandi, at ikki slepst heilt undan slíkum uppgávum í gerandisdegnum, so hevur fylgibólkurin soljóðandi tilmæli:

Mælt verður til, at leiðarin, í tann mun tað ber til, tryggjar, at uppgávur, sum ikki eru partar av námsfrøðiligum arbeiðinum, verða útintar av øðrum fakbólkum, so sum húsavørðum og reingerðarfólkum.

<u>Børn við serligum tørvi</u>

Fylgibólkurin hevur ta fatan, at meira tíð verður brúkt til fyrireiking og eftirmeting í sambandi við børn við serligum tørvi, samanborið við hvørt einstakt barn í barnabólkinum.

Hyggja vit eftir tølunum, so arbeiða 85% av námsfrøðingunum við børnum við serligum tørvi, og teir brúka í miðal 3 tímar um vikuna til eygleiðingar, skriv, fundir o.a. Av hjálparfólkunum arbeiða 36% við børnum við serligum tørvi, og tey brúka í miðal 6 tímar um vikuna.

Samanbera vit tíðina, ið starvsfólkini hava til fyrireiking og eftirmeting, hava námsfrøðingar til samans 4 tímar og hjálparfólk 2,4 tímar um vikuna (sí mynd 2).

**Mynd 20. Tíðarnýtsla til børn við serligum tørvi**




Spurningur: *"Hvussu nógvar tímar brúkar tú til arbeiði við børnum við serligum tørvi í miðal um vikuna (t.d. eygleiðingar, skriv og fundir bæði innan- og uttanhýsis)?"*

Fleiri starvsfólk meta, at tíðin, ið tey brúka til arbeiði í sambandi við børnum við serligum tørvi, er økt tey seinnu árini, og tey halda, at ov nógv orka verður nýtt til fundir og skriv í mun til orkuna, sum verður nýtt til at hjálpa barninum. Sera nógv starvsfólk vísa á, at bíðitíðin til hjálp frá Sernámi er alt ov long, og at tað gongur bæði út yvir børnini við serligum tørvi og hini børnini á stovunum.

**Mynd 21. Øking í tíðarnýtsluni hjá námsfrøðingum og hjálparfólkum til børn við serligum tørvi**




Spurningur: *"Í hvønn mun metir tú, at tíðarnýtslan til arbeiði í sambandi við børn við serligum tørvi er økt seinnu árini?"*

Fylgibólkurin heldur tað vera sera óheppið, at starvsfólk ikki meta seg hava neyðugu tíðina til fyrireiking og eftirmeting, samstundis sum tey meta, at ov nógv orka verður brúkt upp á fundir, skriv o.a. í sambandi við børnum við serligum tørvi.

Fylgibólkurin stúrir fyri, at hetta kann ganga útyvir restina av barnabólkinum, og hyggja vit eftir svarunum, sum summi starvsfólk hava úttalað seg, so siga tey m.a., at um tey høvdu havt meira tíð, so høvdu tey farið meira í dýpdina við tí einstaka barninum, reflekterað yvir, hvat børnini hava tørv á júst nú, hvar tey eru menningarliga, gjørt eina menningarætlan o.s.fr..

Við hesum í huganum hevur fylgibólkurin eftirfylgjandi tilmæli:

Mælt verður til, at leiðarin tryggjar, at tíð til fyrireiking og eftirmeting fevnir um øll børnini og ikki einans børn við serligum tørvi.

# Samanhangir og staðfestingar til umhugsanar

Staðfesting av arbeiði í sambandi við máltíðir

Sum áður nevnt, staðfestir kanningin, at starvsfólk brúka tíð upp á praktisk arbeiði sum reingerðar- og umvælingararbeiði. Eisini sæst á niðanfyristandandi mynd 22, at bæði námsfrøðingar og hjálparfólk brúka tíð upp á máltíðir.

**Mynd 22. Tíðarnýtsla hjá námsfrøðingum og hjálparfólkum til máltíðir**




Spurningur: *"Hvussu nógva tíð brúkar tú til máltíðir, t.d. at gera máltíðir, borðreiða, rudda av og vaska aftan á máltíðirnar í miðal um dagin (minuttir)?"*

Kanningin vísir, at 62% av starvsfólkunum svara, at tey onga køkshjálp hava, og serliga er tað millummáli, ið flestu starvsfólk gera uttan køkshjálp - sí mynd 23 niðanfyri.

**Mynd 23. Máltíðir, námsfrøðingar og hjálparfólk gera uttan køkshjálp**




Spurningur: *"Hvørjar máltíðir gera tit vanliga sjálv á stovuni uttan køkshjálp? (til ber at seta fleiri frámerki)"*

Til spurningin, í hvussu stóran mun børnini luttaka, tá starvsfólkini gera máltíðir, svara 57%, at tey ongantíð luttaka, meðan ávikavist 33% og 10% svara, at børnini av og á ella ofta/altíð eru við.

Spurt verður ikki, um máltíðirnar verða gjørdar sum námsfrøðilig tiltøk, so harvið kunnu vit heldur ikki staðfesta, um luttøkan hjá børnunum er ein partur av sosialisering og almennum dannilsi. Tað kundi tó verið áhugavert at vitað orsøkina til, at so nógv gera máltíðir uttan børn, og hvat skal til at broyta hetta, soleiðis at tað kundi verið partur av námsfrøðiliga arbeiðinum.

**Mynd 24. Luttøka hjá børnum at gera máltíðir**




Spurningur: *"Í hvussu stóran mun luttaka børnini, tá tit gera máltíðirnar á stovuni?"*

Dátugreiningar av svarunum hjá starvsfólkunum vísa, at um køkshjálp er á stovninum, so eru sannlíkindini meiri enn tvær ferðir so stór fyri fastari fyrireikingartíð í mun til um ongin køkshjálp er. Eisini síggja vit, at tað er ein negativur samanhangur millum tess fleiri máltíðir starvsfólkini gera, tess minni tíð er til børn við serligum tørvi.

Hesir samanhangir kunnu ikki beinleiðis staðfesta eitt tilmæli, men møguliga vekja ein áhuga, og geva eina vitan til umhugsanar, sum møguliga kann brúkast í arbeiðinum frameftir, t.d. til at betra um dygdina á námsfrøðiliga arbeiðinum ella at betra um trivnaðin hjá starvsfólkunum.